

*Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins*

# Stórt framstig

*Tað er eitt gleðiligt framstig, at Landsstýrið nú velur at almannakunngera uppritið, heldur Jóannes Eidesgaard, sum tó framhaldandi er misnøgdur við, at øll koritni ikki verða løgd á borðið*

JÁKUP MØRK

- Tað er í øllum førum eitt gleðiligt framstig. Hetta vóru fyrstu orðini hjá Jóannes Eidesgaard, tá vit beint fyri døgurða í gjár kunnaðu hann um, at Landsstýrið fer at almannakunngera uppritið til uttanlandsnevndina.

**Fáa ikki hjálp**

Formaður Javnaðarfloksins segði seg tó framhaldandi vera misnøgdan við, at flokkarnir á tingið ikki kundu síggja uppritið, soleiðis at teir betri kundu taka støðu til innihaldið í hesum.

Hann finst eisini at, at teir serfrøðingar, sum uttanlandsnevndin hevur atgongd til, eru somu serfrøðingar, sum hava verið í allari viðgerð Landsstýrisins av fullveldismálinum. At talan her er um embætisfólk, sum meginpartin av tíðini hava verið við í hesum arbeiði vil eftir hansara tykki viðføra, at hesir serfrøðingar vilja hava ein sterkan loyalitet mótvegis ætlaninum hjá Landsstýrinum.

Eitt nú hava vit ongan møguleika fyri at ráðføra okkum við teir serfrøðingar, sum vit nýttu, tá sjálvstýrisuppskot okkara varð smíðað.

**Ósaklig samanbering**

Jóannes Eidesgaard metir annars, at tað er ein ósaklig samanbering, tá Landsstýrið nýtir handfaranina av undirgrundarmarknaðarmálinum sum grundgevingar fyri, at sjálvstýrismálið verður handfarið í trúnaði.

Tær ferðirnar var støðan ein heilt onnur, tí tá var eingin ivi um, at tað var ein samlað tjóð, sum stóð aftan fyri samráðingarnar. Øll vildu vit jú hava sum mest úr undirgrundini og øll vildu vit hava so víttfevnandi fiskimark sum gjørligt.

Hesu ferð er støðan ein heilt onnur. Ein helmingur av fólkinum er ímóti ætlanum Landsstýrisins, og harumframt verða avleiðingarnar fyri fólkið her á landi nógv størri, enn tær høvdu verið, um t. d. bretska markið var sett eitt vet longur norðuri.

**Ikki ov skjótt**

Upp á spurningin, um talan kanska verður um stuttar samráðingar, nú Landsstýrið skal fáa eina avtalu innan nakrar fáar mánaðir, heldur Jóanes, at hetta er eingin trupulleiki.

- Nú haldi eg teir skulu sleppa at royna seg, sigur Jóannes, sum leggur afturat, at tað hevði verið gleðiligt, um samráðingarnar gingu skjótt.

Eftir hansara tykki hevur hetta málið nýtt somikið stóran part av orkuni í landsins umsiting, og tískil hava onnur stórmál ligið á láni.

- Tískil er tað av alstórum týdningi, at ein niðurstøða verður funnin í hesum málið, soleiðis at vit eisini sleppa at arbeiða við øðrum málum, sum eisini hava stóran týdning, sigur Jóannes Eidesgaard at enda.

# Uppritið kortini almannakunngjørt

*Uppritið til komandi samráðingarnar við danir frá Landsstýrinum til uttanlandsnevndina verður kortini almannakunngjørt, men ikki fyrr enn uttanlandsnevndin er liðug við viðgerðina av hesum*

JÁKUP MØRK



*Anfinn Kallsberg, løgmaður á tíðindafundi í Tinganesi í gjár. Mynd: Jens Kristian Vang*

Á tíðindafundi fríggjadagin, kunnaði Landsstýrið føroysku fjølmiðlarnar um gongdina í fullveldismálinum. Løgmaður byrjaði fundin við at greiða frá, at orsøkin til fundin var fyrst og fremst, at Landsstýrið seinastu tíðina hevur fingið harðar ákoyringar fyri, at alt málið viðvíkjandi fullveldi, ella sjálvstýri, verður hildið loyniligt fyri almenninginum.

**Verður almannakunngjørt**

Løgmaður førdi serliga fram, at tað kann órógva viðgerðina hjá uttanlandsnevndini, um uppritið varð kent av almenninginum. Annfinn Kallsberg kundi tó samstundis bera tey boð, at eftir at uttanlandsnevndin er liðug við sína viðgerð av uppritinum, er ætlanin at tað skal almannakunngerast.

At sjálvt uppritið verður almannakunngjørt, meta hvørki Løgmaður ella varaløgmaður hava stórvegis strategiskan týdning. Hinvegin leggja teir stóran dent á, at tær ætlanir og tey mál, sum Landsstýrið í samráð við uttanlandsnevndina kemur fram til, verða viðgjørd í trúnaði.

Verða hesi viðurskifti ikki hildin í trúnaði, er stórur vandi fyri, at hetta kann skaða samráðingarstøðu føroyinga, tá veruligu samráðingarnar við danir byrja nú í summar.

**Prinsipielt mál**

Landsstýrið leggur stóran dent á, at trúnaðarspurningurin í hesum føri er eitt ógvuliga prinsipielt mál, tí hetta vil viðkoma framtíðar arbeiðinum hjá uttanlandsnevndini.

Samanborið var eisini við marknaðarsamráðingarnar við bretar, eins og undirgrundaravtaluna við danir. Tær ferðirnar varð alt málið handfarið í trúnaði, uttan at nakar mótmælti hesum.

- Uttanlandsnevndin virkar sum ráðgevi hjá Landsstýrinum, og tí er týdningarmikið at uttanlandsnevndin fær allar upplýsingar á borðið, greiddi løgmaður frá, og legði afturat, at um slíkar upplýsingar ikki verða handfarnar í trúnaði, kann hetta fáa stóra ávirkan á, hvørjir upplýsingar verða latnir nevndini í framtíðini, tá onnur mál vera til viðgerðar.

Harumframt legði løgmaður eisini dent á, at uttanlandsnevndin hevur atgongd til alla ta serkønu hjálp, sum Landsstýrið hevur nýtt í sínari viðgerð, soleiðis at fakligi førleikin í viðgerðini eisini er í lagi.

**Atkvøða í heyst**

Sum nevnt verður væntandi farið undir samráðingarnar um lutflasliga stutta tíð.

Málið hjá Landsstýrinum hevur alla tíðina verið, at fólkaatvøða skal verða á heysti í ár, og hetta er framvegis arbeiðssetningurin.

Skal hetta gerast veruleiki, er neyðugt at bæði løgting og fólkating hava viðtikið ætlaðu broytingarnar í ríkisrættarligu støðu Føroya, og tískil mugu samráðingarnar vera lidnar tíðliga í heyst.

Hetta vil uttan iva viðføra, at talan verður um rættuliga intensar samráðingar, har tað ikki er rúmd fyri at spilla ov nógva tíð. Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum. Hann legði tó dent á, at í fyrstu umførunum verða ikki allir smálutir fingnir upp á pláss, men at teir hinvegin fara at samráðast um, undir hvørjum rammum eitt framtíðar samstarv við danir skal byggja á.

- Søgan endar ikki við samráðingunum við danir, segði Høgni Hoydal, tástaðni byrjar hon.






# Riggar tú til fisk ?



...vit søkja eftir 20 ungum kvinnum og monnum, i› skulu mynda føroyska fiskivinnu komandi árini.

**Eitt sindur um teg**

Tú ert púra vitandi um, at Føroyar hava brúk fyri tær. Ta› sæst ikki á skræ›uni, men tú hevur eitt brennandi ynski um at taka lut í at ávirka framtí›ina í Føroyum.

**Eitt sindur um okkum**

Vit bjó›a eina spennandi útbúgving, i› tekur stø›i í veruleikanum. Ta›, tú lærir, kanst tú brúka, og tey, i› undirvísa, eru fólk í lyklastørvum í føroysku fiskivinnuni.

**Fiskivinnuskúlin bjó›ar tvinnar útbúgvingar**

4 2 ára vinnurætta› útbúgving (AIF), i› gevur beinlei›is atgongd til arbei›smarkna›in ella tøkniligar útbúgvingar á matvøruøkinum.

4 3 ára yrkisgymnasial útbúgving (HIF). At ein útbúgving er yrkisgymnasial merkir, at hon gevur atgongd til hægri útbúgvingar.

**Ring 424573 og bi› um umsóknarbla›.**



stephanssons hús

## Fiskivinnuskúlin í Vestmanna

**Postrúm 96 - 350 Vestmanna - Tlf. 42 45 73/42 44 96 - Fax 42 44 28**
**www. fiskvest.fo - Teldupostur: fiskvest@fiskvest.fo**